# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## UG–pluss til semingsmenn og samráðingarpartar

Eftir hóttanir ella gitingar um verkfall ella arbeiðssteðg hangandi yvir sær í eina tíð raknaði alt Føroya fólk upp týsmorgunin til tey góðu tíðindini um, at einki verkfall fór at vera á hesum sinni. Og ikki heldur komandi trý árini. Tað eydnaðist nevniliga pørtunum á arbeiðsmarknaðinum at røkka eini semju, sum er søgulig eisini, tí hon er fyri heili trý ár.

Tað gingu annars leysatíðindi um, at partarnir stóðu sera langt frá hvørjum øðrum, og at vit helst fóru at fáa eitt drúgvt verkfall. Hetta var eisini orsøkin til, at mong keyptu inn undir seg, bensin ikki minst og síðani epli. Lagt varð upp til enn eitt lemjandi verkfall, har ikki minst høvuðsvinnan, fiskiflotin og flakavirkini fóru at stegða upp.

Tað skuldi tó vísa seg, at semingsmenninir, Terji Sigurðsson og Símun Absalonsen megnaðu sína álitisuppgávu til fulnar, til eitt UG-pluss. Hetta vóru øll samd um, eftir at avtala varð undirskrivað, men eitt eru skilagóðir og semjusøkjandi semingsmenn, annað eru partarnir, sum skulu til at góðtaka eina semju. Og hertil er at siga, at teir vístu sama skynsemi við at ganga inn fyri tí semingsuppskoti, ið varð lagt fram. So hetta er tað vit kunnu kalla eina vinnarasak, har allir partar vórðu sigursharrar: arbeiðarafeløgini, arbeiðsgevararnir og seminsgsmenninir. Eitt stórt tillukku við tí, nú samfelagshjólini kunnu koyra ótarnað víðari komandi trý árini.

Við nýggja sáttmálanum hava limir hjá arbeiðarafeløgunum fingið fleiri túsund krónur í lønarhækkan sigur Samtak í skrivi. Tann mesta lønarhækkanin er til tey, sum hava starvast í 7 ár og sum sostatt fáa 3,25% omaná grundlønina í viðbót. Í krónum merkir tað, at tímalønin hjá fólki við 7 ára starvstíð hækkar í ár góðar 10.000 kr., meðan hækkingin í 2008 er um 5000 kr. í bæði 2008 og 5000 kr í 2009. Árslønin hjá fólki við fullum starvsaldri verður tískil í 2009 234.665 kr - hetta er við frítíðarløn. Hjá teimum sum ongan starvsaldur hækkar ársinntøkan fyrsta árið góðar 7000 kr til 214.478 kr. Í 2009 verður grundlønin 224.204 kr ella umleið 17.000 kr meir enn í dag. Eftirlønin hjá arbeiðarafeløgunum veksur 3% yvir 3 ár og verður 9,1% í 2009. Landsstýrið arbeiðir við eini loysn sum leggur upp til at arbeiðsmarknaðareftirlønin verður 15% innanfyri eitt 10 ára skeið. Arbeiðarafeløgini hava sett sær sum mál at røkka hesum setningi tey næstu árini.

Vit kunnu bert staðfesta, at friður verður á arbeiðsmarknaðinum mong ár fram, og er hetta eitt sera gott signal eisini at senda umheiminum, sum vit samstarva og hava samhandil við. Hetta var kanska besta gávan til Føroya fólk, nú vit annars gera okkum út til eitt vónandi heitt summar.

**Sosialurin**

## Er trivnaður bert fyri tey, ið búgva í Suðurstreymi?

**ANNA ARABO**

Høgni Mikkelsen býráðslimur hevur allarhelst ikki lisið brævið, sum eg hevði í Sosialinum t. 19/4. Tá spurdi eg, hvør skuldi brúka stásligu ítrottarhøllina í Kollafirði, tí ungdómurin fær ikki loyvi at byggja her.

Kann Høgni, ella onkur annar í býráðnum svara mær, hví ongin kommunal útstykking er her norðuri?

Sum eg eisini skrivaði tá, so eru bert seks grundstykkir givin tey seks árini vit hava verið í Havnar kommunu, øll úti í Kollafirði. Her inni í Firði, Oyrareingjum og Signabø eru nógv øki at byggja á. Okkum nýtist ikki at fara upp í fjøllini og byggja, men man hevur varhugan av, at Havnar Kommuna ætlar at avtofta hesi nevndu økini.

Eg havi onki ímóti einari bingjuhavn, men eg, og fleiri við mær, eru ímóti at kroysta hana niður á Oyrareingjum, tí tá verður ikki liviligt her. Allar staðir í Norðanlondum leggja tey eina tílíka havn uttan fyri bygt øki, tí hetta er larmandi virksemi.

Trivnaður kann ikki gerast upp í krónum og oyrum, so einfalt er tað!

Á Oyrareingjum 14/5

## Á myndini vantar…



**EYÐGUNN SAMUELSEN**
býráðslimur



Vit vóru fleiri, ið vónaðu at "familjumyndin" av landsstýrissamgonguni, ið varð skipað eftir valið í 2004, fór at verða tann síðsta myndin av eini stjórn í Føroyum har annað kynið vantaði á myndini, men gakk, so var ikki. Í gjár var samgongan formliga umskipað við tað, at vit fingu ein nýggjan landsstýrismann í fíggjarmálum, og aftur hesaferð vantaði onkur á myndini. Hetta skal ikki skiljast sum ein ábreiðsla móti Magna Laksafoss, honum verður ynskt góða eydnu við starvinum.

Tað sum er skuffandi, er at langt sýnist millum orð og gerðir hjá politisku flokkunum. Ljóskastarin hevur í longri tíð verið vendur móti kynsbýtinum í politisku skipanini, nógv góð orð hava verið søgd frá politiskari síðu til fyrimuns fyri einum javnari býti, og nú var møguleikin har. Til hevði borið at sett eina kvinnu í landsstýrið uttan at brotið nakra sum helst demokratiska reglu í okkara samfelag, tí landsstýrisfólk nýtast als ikki at vera fólkavald. Hetta hevði verið ein sterk fráboðan í verki, til eitt komandi val frá samgonguni, um at teir vilja fegnir hava at býtið millum kynini verður frægari eftir valið komandi, enn tað er í dag.

Vónandi var omanfyrinevnda hending ein fótfeilur í einari skjótari vending og ikki eitt tekin upp á vantandi ynski um javnari kynsbýti í okkara politisku skipan.

*heima.olivant.fo*

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.